VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Strúkur í vindi upp í skrið av suðri, møguliga við harðari hvirlum. Út á seinnapartin minkandi til stívt andøvsgul til hvassan vind av útsynningi. Skýggjað og ælaveður, sum líður á dagin turrari. Hitin millum 5 til 8 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Strúkur í vindi til hvassan vind av útsynningi. Skýggjað og ælaveður, tó eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig



Veðrið leygardagin :
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og landsynningi. Skýggjað og nakað av regni. Hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av suðri, út á dagin eitt skifti av landsynningi og eystri. Skýggjað og regn ella ælaveður. Hitin millum 5 til 8 stig.

Veðrið mánadagin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, seinni av suðri og minkandi. Skýggjað og regn ella ælaveður. Hitin millum 5 til 8 stig.

Málaðu fyri Frelsunarherin í Havn

24. listaframsýningin hjá Lions í Eysturoy á páskum gav 150.000 kr, sum fóru til Frelsnarherin í Havn

LISTAFRAMSÝNING
Eirikur Lindenskov/ Jonhard Hammer

– Eg veit ikki, hvussu stórur munur er á at mála við orðum og penslum, men ofta tykist mær, at munurin ikki er so stórur, segði Jógvan á Lakjuni tá hann setti listaframsýningina hjá Lions í Eysturoy – og hugleiddi um Hans Andreas Djurhuus, sum mentamálaráðharrin metir sum eitt av okkara matastu skøldum
Mynd: Jonhard Hammer

Tilsamans 367 listarverk vórðu sýnd fram á listaframsýningini hjá Lions í Eysturoy á páskum. 59 listarverk úr øllum Føroyum – uttan Suðuroy – høvdu málað verkini.

Hetta er 24. árið á rað, at Lions í Eysturoy hevur skipað fyri hesi framsýning í Runavík, sum hvørja ferð hevur sum endamál at stuðla onkrum humaniterum endamáli. Hesaferð fer allur peningurin, ið inn kom, til Frelsunarherin í Havn.

– Vanliga fáa vit millum 130.000 og 170.000 kr í kassan, og hesaferð lá sølan um 150.000 krónur, sigur Niclas Foldbo, sum er ein av fyrireikarunum.

Tað var Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, sum setti framsýningina. Hann hugleiddi m.a. um hvussu føroyskar kvinnur og menn gjøgnum árini hava fingist við myndandi list, eitt nú við prýddum pløggum og prýddum búnýti.

Hann nevndi eisini um fyrsta listamálaran, vit vita um í Føroyum, Díðrik á Skarvanesi, sum var føddur í Dímun í 1802 og sum livdi stóran part av ævi síni sum húskallur á Skarvanesi.

Jógvan á Lakjuni bar eisini saman við mætasta litamálara okkara, S. J. Mikines, sum eisini var ættaður av útoyggj.

Jógvan á Lakjuni er eisini sjálvur listarmaður. Hann er eitt av okkara frægu tónaskøldum og hevur hann eitt nú yrkt vakra lagið til sálmin hjá Hans Andreasi, »Gakk tú tryggur fram við góðum treysti«, sum er vanligur sálmur í føroysku fólkakirkjunum – og nærum standard sálmur við jarðarferðir.

Sum vera man er Jógvan á Lakjuni hugtikin av Hans Andreasi Djurhuus, ið hann metir sum okkara størsta skald.

– Eg veit ikki, hvussu stórur munur tað er á at mála og yrkja – at mála við pensli og at mála við orðum – men ofta tykir mær, at munurin ikki er so stórur, segði hann.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷14
Nuuk	„6
Qaqortoq	1
Ammassalik	÷4
Saint John's	7
Halifax	4
Reykjavík	2
Seyðisfjørður	7
Tórshavn	7
Lerwick	8
Aberdeen	13
London	12
Tromsø	2
Bergen	6
Oslo	–
Stokkhólm	10
Keypmannah.	11
Helsinki	4
Moskva	6
Berlin	11
Warzawa	11
Kiev	9
Bukarest	7
Paris	12
Madrid	12
Róm	14
Malorca	17
Athen	19
Malta	17
Tunis	19
Beijing	24
New Dehli	37
Bangkok	37
Jakarta	31
Sydney	24
New York	7
Miami	27
Los Angeles	16
Meksikobýur	21
Panama	–
La Paz	16
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	33

LUFTTRÝSTIÐ

Eitt lágtrýst í ein útnyrðing úr Írlandi fer í ein norðan og verður í nátt vestan fyri Føroyar og hevur vind og regn við sær.

Í vikuskiftinum nærkast eitt annað lágtrýst vestaneftir og brúgvaløg haðani koma inn yvir Føroyar.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 13/04 kl. 06⁰⁰– 14/04 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,8°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

AVFALLIÐ



Avfallið: 7,0 mm – mált frá 13/04 kl. 06⁰⁰–14/04 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 28,1 mm



VESTFALLSKYRRINDI

8. apríl: Mánin næstur jørðini
12. apríl: Seinna kvarter
19. apríl: Tendring
24. apríl: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/ Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/ Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
15. apr	04.39	17.02	03.39	16.02	03.54	16.17	06.39	19.02	07.39	20.02	02.54	15.17	01.54	14.17	04.54	17.17	05.54	18.17	04.24	16.47	05.39	18.02
16. apr	05.22	17.44	04.22	16.44	04.37	16.59	07.22	19.44	08.22	20.44	03.37	15.59	02.37	14.59	05.37	17.59	06.37	18.59	05.07	17.29	06.22	18.44
17. apr	06.04	18.25	05.04	17.25	05.19	17.40	08.04	20.25	09.04	21.25	04.19	16.40	03.19	15.40	06.19	18.40	07.19	19.40	05.49	18.10	07.04	19.25
18. apr	06.45	19.04	05.45	18.04	06.00	18.19	08.45	21.04	09.45	22.04	05.00	17.19	04.00	16.19	07.00	19.19	08.00	20.19	06.30	18.49	07.45	20.04

5 707265 100043 >